# SETRIÐ Í HAVN LÆT DYRNAR UPP TIL HOUSTON



*Hilmar Simonsen uttanfyri høvuðssæti hjá seismikkfyritøkuni ION Geophysical í Houston í Texas*

**STØRV** – Uttan Fróðskaparsetrið og professaran Jim Brown hevði eg neyvan verið í hesum starvinum í dag. Eg eri eisini bilsin av at uppliva, hvussu nógv av tí eg havi lært á Setrinum, eg ítøkiliga havi brúk fyri í arbeiðinum sigur Hilmar Simonsen, sum júst hevur fingið starv hjá amerikanskari fyritøku.

Jan Müller

Hann fekk master-prógv í jarð- og jarðalisfrøði á universitetinum í Århus í 2003 og flutti um sama mundi heim til Føroya at búgva, tí hann hevði eina dóttur her. Men illa gekst at fáa arbeiði innan hetta yrkið, so hann noyddist at leita aðrar leiðir og endaði við at gerast blaðmaður seint á sumri í 2003. Í 2006 lýsti Fróðskaparsetrið eftir PhD-lesandi í leitingar-jarðalisfrøði. Hilmar søkti og fekk starvið. Talan er um Hilmar Simonsen, sum altíð hevur havt áhuga fyri jarðfrøði og í tí sambandi eisini oljuvinnu í breiðari merking.

Fróðskaparsetrið í Havn skuldi koma at gera munin í framtíðar arbeiðslívinum hjá Hilmari. Á Setrinum kom hann at arbeiða við eini granskingarverkætlan, sum umfataði upptøku, viðgerð, og tulking av seismiskum dátum við atliti til føroyska basaltið. Hilmar var heppin at fáa ein sera royndan og dugnaligan vegleiðara - kanadiumannin Jim Brown, sum var komin til Føroya eitt ár frammanundan í starv á Fróðskaparsetrinum sum professari í leitingar-jarðalisfrøði. Jim Brown hevur drúgvar altjóða royndir bæði innan ídnaðin og akademiska heimin. Hann starvast nú á universitetinum í Stavanger, har hann fyri hálvum ári síðani fekk nýtt starv, hóast hann er farin um pensiónsaldur. Sjálvur er Hilmar ikki í iva: – Hann var ein sannur fongur fyri Fróðskaparsetrið, og eg eri sera takksamur fyri at hava havt hann sum vegleiðara. Bert spell at hann ikki er har longur.

PhD verkætlanin varð stuðlað av fleiri ymiskum feløgum og stovnum, men mesti stuðulin kom frá Granskingarráðnum, Statoil, ConocoPhillips, Landmark-Halliburton, BP, Atlantic Petroleum og Geysir Petroleum.

Hilmar greiðir frá, at meðan hann arbeiddi við verkætlanini sendi hann stundum samandráttir (abstracts) av sínum granskingarúrslitum til ummælis í samband við altjóða ráðstevnur. Hetta førdi millum annað til, at hann í 2009 fekk góðkenning úr USA at koma til Houston at halda framløgu á árligu ráðstevnuni hjá felagskapinum SEG (Society of Exploration Geophysicists). Hendan árliga afturvendandi ráðstevnan umfatar hundraðtals framløgur við fakligum og nýskapandi innihaldi, umframt marknaðarføring av vørum og tænastum, har oljufeløg og feløg við tilknýti til oljuvinnuna sýna fram lutir og tøkni. Ein av teimum stóru og vøkru básunum átti amerikanska fyritøkan Ion Geophysical, og tað var av tilvild at Hilmar kom í samband við hesa fyritøkuna.

## Ovfarin

– Vit vóru fleiri lesandi, sum stóðu har og prátaðu, tá ein "skjótt snakkandi" maður kom og bjóðaði okkum ein busstúr dagin eftir út hagar, sum fyritøkan heldur til. Slíkar fyritøkur gera nógv fyri at tekkjast teimum, sum skjótt eru liðug at lesa og at fáa tey at søkja starv hjá sær sigur Hilmar og heldur fram:

– Eg tók sjálvandi av, og komin út hagar sá eg hetta

## Føroyar klekja fólk til oljuvinnu

**Eitt stórt tal av føroyingum arbeiðir í frálanda/oljuvinnu og vinnum við tilknýti til tær í nógvum londum kring heimin. Føroyskir útbúgvarstovnar eiga ein stóra lut í hesi gongd, og millum hesar telist eisini Fróðskaparsetrið. Hilmar Simonsen, sum Sosialurin hevur gjørt samrøðu við, er bert eitt av hesum mongu fólkum, sum hevur fingið starv í útlandinum eftir at hava útbúgvið seg í Føroyum. Hann heldur, at vit eiga at hjúkla um og menna Fróðskaparsetrið, tí tað hevur og kann fáa uppaftur størri týdning fyri útbúnar føroyingar, sum ætla sær út í stóru verið at fáa sær arbeiðsroyndir – og hvør veit – ein dag at venda heimaftur til eitt nú eina føroyska oljuvinnu at arbeiða.**




*Hilmar Simonsen skal arbeiða umborð á hesum skipinum. Reiðaríið eitur Polarcus, men hann starvast hjá Ion Geophysical, sum stendur fyri tí seismiska partinum, know-how'inum*